# Nýggi Smyril fær trý ymisk atløgupláss í Havn

**Fyribils skal nýggi Smyril bæði brúka atløguplássið hjá Norrønu og krókin undir Havnarskrivstovuni, men onkran túr skal hann eisini ligga úti á Molanum**

SUÐUROYARSIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



Eitt er vist: Ferðafólk, sum ætla at sigla við Smyrli ímillum Suðuroynna og Havnina mugu vera púra edrú.

Eru tey ikki tað, verður tað skjótt at villast á havnarkei.

Nógv kjak hevur verið um, hvar nýggi Smyril skal hava atløgupláss í Havnini. Men nú hevur ein arbeiðsbólkur mælt til, at nýggi Smyril fyribils fær trý ymisk atløgupláss.

Arbeiðsbólkurin hevur kannað eftir, hvørjir møguleikar, Tórshavnar Havn hevur at taka ímóti nýggja Smyrli, tá ið hann kemur í heyst.

Arbeiðsbólkurin sigur, at sum umstøðurnar eru nú, er tann besta fyribilsloysnin, at nýggi Smyril fær trý ymisk atløgupláss í Havn.

Í fyrsta lagi mælir arbeiðsbólkurin til, at nýggi Smyril brúkar ferjuleguna hjá Norrønu, tá ið hon ikki er í Havn.

Í øðrum lagi mælir arbeiðsbólkurin til, at nýggi Smyril liggur í krókinum undir Havnarskrivstovuni, tá ið Norrøna er í Havn, men tá skip hjá Skipafelagnum ikki er í Havn

Og í triðja lagi mælir arbeiðsbólkurin til, at nýggi Smyril leggur at úti á Molanum, tá ið bæði Norrøna og skip hjá Skipafelagnum eru í Havn.

Soleiðis sum Norrøna siglur nú, og heldur ferðaætlanina, verður tað einar tríggjar ferðir um vikuna, at Smyril ikki kann liggja í leguni framvið Eystaru bryggju.

– Men tað er tó ikki óvanligt, at Norrøna er seinkað, so tað kann stundum verða oftari, at Smyril ikki fær brúkt leguna hjá Norrønu, sigur arbeiðsbólkurin.

– Annars verður tað serliga mánamorgun, at trupulleikar vera hjá Smyrli at sleppa at í krókinum, tí tá liggur skip hjá Skipafelagnum har.

Tá verður neyðugt at liggja úti á molanum, sigur Arbeiðsbólkurin.

Í arbeiðsbólkinum hava verið Jónsvein Lamhauge og Arnbjørn Christiansen, Tórshavnar Havn, Ewald Kjølbro fyri Landsverk, Kristian Davidsen og Hanus Lassen fyri Strandferðsluna og Niels Winther fyri vinnumálaráðið.

Arbeiðsbólkurin leggur stóran dent á, at talan er um eina fyribilsloysn, sum langt frá er tann besta.

Men hetta er heldur ikki verri enn skipanin, sum Smyril brúkar nú.

### Byggja út fyri fimm milliónir

Arbeiðsbólkurin sigur, at verður tilmælið fylgt, verður neyðugt at byggja út fyri einar fimm milliónir.

Nýggj gongubrúgv skal gerast við ferjuleguna hjá Norrønu, yvir í trapputornið hjá Norrønu. Í krókinum undir havnarskrivstovuni verður neyðugt at dýpa eitt sindur einar 15-20 metrar framvið molanum. Samstundis skal stoypast, har hekkuportrið kemur niður á bryggjuna, umframt at hægri fendarar skulu setast upp

Úti á Molanum verður eisini neyðugt at seta hægri fendarar.

Umframt tær fimm milliónirnar, hetta kostar, má landið eisini gjalda nýtslugjald fyri at brúka trapputornið, sum Tórshavnar Havn gjørdi til Norrønu. Í løtuni leigar Smyril Line tornið. Trý tey fyrstu árini er leigan 165.000 krónur um mánaðin. Eftir tað verður leigan 50.000 um mánaðin. Hvussu stórt nýtslugjaldið hjá Strandferðsluni verður, er ein samráðingarspurningur.

Afturat hesum má Strandferslan leiga bussar at koyra fólk ímillum farstøðina og Smyril, tá ið hann liggur á Molanum, tí fólk sleppa ikki at ganga ímillum. Hetta fer at kosta minni enn 50.000 krónur um árið.

Skipaeftirlitið hevur boðað frá, at verður hetta skipað væl, dugir tað ikki at síggja nakrar trupulleikar.

# Nýggi Smyril kann liggja í Havn ella á Gomlu Rætt

**Ymsir møguleikar eru fyri at útvega nýggja Smyrli varandi atløgupláss í Havn, men ein møguleiki er at flyta hann á Gomlu Rætt, sigur ein arbeiðsbólkur**

SUÐUROYARSIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



Arbeiðsbólkurin, sum hevur kannað atløguviðurskiftini hjá nýggja Smyrli í Havn, (sí hina greinina her á síðuni) hevur eisini gjørt nakrar metingar um, hvørjir møguleikar eru fyri at útvega nýggja Smyrli fast atløgupláss í høvuðsstaðnum.

Men enn eru ongar endaligar niðurstøður gjørdar og bólkurin mælir til, at hann heldur fram við arbeiðnum, so at hann eisini kann koma við eini tilráðing um eina varandi loysn.

### Fimm møguleikar

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt fimm møguleikar fyri eini varandi loysn til nýggja Smyril.

Ein møguleiki er at gera atløgupláss úti á Skansabryggjuna.

Men skal tað kunna brúkast í øllum veðri, verður neyðugt at leingja grótkastið og at gera havnaøkið størri.

– Í øllum førum er hetta ein útbygging, sum fer at kosta yvir 100 milliónir, umframt at nýtt trapputorn skal gerast til ferðafólkið.

Arbeiðsbólkurin metir, at hetta kann verða ein ein góð loysn, hóast umstøðurnar hjá ferðafólki til gongu kanska ikki verða so góðar, tí tað er nakað langt ímillum Skansabryggjuna og farstøðina á Eystaru bryggju.

Ein annar møguleiki er at gera nýggja Smyrli fast pláss í krókinum undir Havnarskrivstovuni, so at hann bara kemur at skifta ímillum atløguplássið hjá Norrønu, tá ið hon ikki er í Havn og krókin, tá ið hon er í Havn.

Men ein fortreyt fyri hesum, er, at skipini hjá Skipafelagnum mugu flyta aðrastaðni at liggja.

– Tað hevur stóran týdning fyri Skipafelagið, at stutt er frá skipinum til pakkhúsið, bæði fyri at avgreiða skipini effektivt og fyri at vøran skal halda sær. Tí ber ikki til at flyta skipini uttan samstundis at flyta pakkhúsið, sigur arbeiðsbólkurin. Men tað er ivasamt um tað ber til at flyta pakkhúsið longri út á molan uttan at gera umstøðurnar í pakkhúsinum verri.

Ein annar møguleiki er at Tórshavnar Havn flytir alt bingjuvirksemið til Kollafjarðar. Tórshavnar Havn hevur tó ikki enn tikið støðu til, hvar bingjuvirksemið skal plaserast í framtíðini, og ivasamt er, nær henda avgerðin verður tikin.

– Tað má eisini havast í huga, at tað er dýrt at flyta bingjuvirksemið, og vil landið hava ávirkan á hesa gongdina, er helst neyðugt, at landið má gjalda fyri hetta.

Tórshavnar Havn hevur eisini staðiliga gjørt vart við, at ein langtíðarloysn til nýggja Smyril ikki má ávirka viðskiftafólkini hjá Tórshavnar Havn neiliga.

Skal arbeiðast víðari við einari slíkari loysn er tað sostatt neyðugt, at tað verður gjørt í samstarvi við bæði Tórshavnar Havn og Skipafelagið.

Ein triði møguleiki er at gera fast pláss til nýggja Smyril á Viðanesi. Men Viðanes er fiskivinnuhavn og liggur langt frá farstøð og farmavirkseminum annars. Tí verður tvørligt at samskipa ferðsluna og farmaflutningin frá nýggja Smyrli við ferðsluna og farmaflutningin á eystaru bryggju.

Á Viðanesi mugu stórar útbyggingar til, eitt nú trapputorn til ferðafólk, øki til bilar, ferjuskráa, fendarar o.a.

Fjórði møguleikin er at lata nýggja suðuroyarskipið fáa fast atløgupláss, har Norrøna nú leggur at.

Men so má Norrøna flyta og í løtuni eru eingi útlit til, at Smyril Line ætlar sær at flyta Norrønu til aðra havn í Føroyum.

Tosað hevur verið um møguleikan at tillaga ferðaætlanirnar hjá Norrønu og Smyrli, so bæði skipini kunnu nýta leguna framvið eystaru bryggju, men av tí at bæði Norrøna og Smyril kunnu verða seinkað, og av tí at tað kann verða tørvur á at broyta ferðaætlanirnar í framtíðini, metir arbeiðsbólkurin ikki, at hetta er nøkur loysn.

Og seinasti møguleikin, sum arbeiðsbólkurin vísur á til nýggja Smyril, er Gamla Rætt.

Men so verður neyðugt at byggja Gomlu Rætt út og at gera nýtt trapputorn.

– Ein týðandi óvissa í hesari loysnini er, at nýggi Smyril verður noyddur at venda uttanfyri havnina og bakka inn. Ti má fyrst kannast um um hetta ber til.



# Suðuroyingar sleppa ikki at keypa skip

**Suðuroyingar, sum ætla at keypa eitt stórt fiskiskip, hava fingið noktandi svar úr landsstýrinum. Men teir gevast ikki so**

FYRITAKSSEMI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Hetta var eitt stórt vónbrot, sigur Finnbjørn Poulsen í Lopra. Men teir ætla ikki at gevast so*

Tað eru ikki útlit til at Finnbjørn Poulsen, skipari í Lopra, og aðrir suðuroyingar, fáa dreym sín uppfyltan.

Herfyri søktu teir Fiskimálaráðið um innflutningsloyvi til eitt stórt fiskiskip. Men tað fáa teir ikki!

Fiskimálaráðið hevur nú viðgjørt umsóknina og avgjørt at geva teimum noktandi svar.

Skipið, sum Finnbjørn Poulsen og teir ætlaðu at keypa, var eitt skip til uppisjóvarfisk og sum skal fiska svartkjaft, lodnu, sild og makrel.

Hann sigur eisini, at teir høvdu lutfalsliga nýggj skip í kikaranum, sum tað bar til at keypa fyri einar 40-50 milliónir.

Talan er um skip, ið taka 1500-2000 tons.

Hetta skipið skuldi vera eitt lið í eini størri menningarætlan í Suðuroynni. Ætlanin var eisini at byggja eitt virki í Suðuroy at virka uppisjóvarfisk og endamálið við skipinum var, at tað skuldi tryggja virkinum rávøruna.

Samtundis høvdu teir gjørt avtalur við onnur skip um avreiða til virkið fyri at tryggja nóg nógva rávøru. Og Finnbjørn Poulsen leggur dent á, at talan er um eina føroyska ætlan og at teir ikki eru skutilsveinar fyri útlendsk, peningalig áhugamál.

Hann leggur afturat, teir hava sostatt ikki biðið um eitt oyra í studningi.

Í fyrstu syftu hevði hetta útvega arbeiðið til eini 50-70 fólk, men gekst sum ætlað, fór hetta at skapa nógv fleiri arbeiðspláss seinni.

Skiparin úr Lopra sigur, at hetta er ein ætlan, sum teir hava hugsað væl og virðiliga um.

– Vit hava havt serkøn á økinum til at gera marknaðarkanningar fyri okkum og útlitini eru sera góð. Samstundis hava teir longu útvega neyðuga peningin til at seta ætlanina í verk

Hann vísir eisini á, at Suðuroyggin eigur ongan lut í uppisjóvarvinnuni og tí er ætlanin sera viðkomandi, serliga tá ið hugsað verður um tað stóru kreppu, sum økið er í.

### Vónbrot

Men í Fiskimálaráðnum eru tey ikki líka hugtikin av hesi verkætlanini, sum suðuroyingar eru, tí ráðið vil ikki geva teimum innflutningsloyvi til skipið.

Men ráðið leggur dent á, at við hesum hevur tað bara tikið støðu til sjálvt skipið. Støða er sostatt ikki tikin til ætlaða virkið á landi.

Fiskimálaráðið sigur, at tað er nóg mikið av skipum til at gagnnýta tey rættindi, vit hava av uppisjóvarfiski og at tað tí ikki er grundarlag fyri fleiri skpum.

Hesum er Finnbjørn Poulsen púra ósamdur í.

Hann heldur ikki, at tað er nóg mikið av skipum í Føroyum til uppisjóvarfisk við teimum fiskirættindum, vit hava.

– Føroyingar hava ligið sjóvarfallið av sær í uppisjóvarvinnuni og hava verið alt ov trekir at útvega sær skip til endamálið. Sostatt koma vit eisini at vera eftirbátur, tá ið svartkjafturin einaferð verður býttur sundur ímillum tey ymsu londini.

Hann vísur eisini á, at í fjør var føroyska kvotan av atlantosildini uppfiskað fyri fyrstu ferð í nógv ár.

– Men tað allarmesta av henni varð avskipað til móðurskip. Eg haldi ikki at tað er rætt at lata fyrsta floks rávøru fara til djóraføði, bara fyri at fáa kvotuna uppfiskað, heldur enn at virka hana til matna, har hon gevur munandi meiri úrtøku.

Samstundis vísa teir eisini á, at lodnan undir Íslandi, Grønlandi og í Barentshavinum eru eisini áhugaverd fiskasløg hjá einum skipi, sum suðuroyingarnir hugsa um, eins og hestamakrelur og nebbasild í kanalini og í Norðsjónum og vestanfyri fýra stig, eisini eru tað.

Finnbjørn Poulsen dylir ikki fyri, at hann er ógvuliga vónbrotin av støðuni hjá Fiskimálaráðnum.

Men hann sigur, at teir fara ikki at gevast so.

Í næstum fara teir sostatt at biðja um fund við Løgmann um málið og har ætlanin er at greiða nærri frá tiltakinum.

# Leypir gleðiliga allar bygdirnar í Suðuroy um

**Borgarstjórin á Tvøroyri hevur einki ímóti at leggja saman við Sumbiar Kommunu**

SAMANLEGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Borgarstjórin á Tvøroyri, Kristin Michelsen, fer fegin á fund við Sumbiar Bygdaráð at tosa um samanlegging*

– Eg skal gleðiliga leypa allar bygdirnar í Suðuroy um.

Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri, fer fegin á fund við Sumbiar Kommunu at tosa um samanlegging.

Sumbiar Kommuna hevur boðið øllum kommunum í Suðuroy á fund at tosa um at leggja alla oynna í eina kommunu.

Men bara Tvøroyri tók av, allar hinar søgdu nei.

Tessvegna fer Sumbiar Bygdaráð nú at bjóða Tvøroyrar býráð á fund um at leggja tær báðar kommunurnar saman.

Borgarstjórin í Sumba hevur als onki ímóti at leggja Sumba og Tvøroyri saman í eina kommunu.

Og tað er borgarstjórin á Tvøroyri samdur í.

Hann sigur, at býráðið á Tvøroyri hevur ikki viðgjørt spurningin um at leggja saman við Sumbiar Kommunu.

Men sjálvur hevur onki ímóti tí.

– Eg skal fegin leypa allar bygdirnar í Suðuroy um fyri at leggja saman við sumbingum, sigur hann.

Hann sigur sostatt verður tað við opnum sinni, at Tvøroyrar býráð fer á fund við Sumbiar Bygdaráð.

Hann heldur, at tað er neyðugt at øll oyggin verður løgd í eina kommunu og at hetta kann verða fyrsta stigið á leiðini.

At kommunurnar ikki eru grannakommunur, men eru í hvør sínum enda í oynni, sær hann ongan trupulleika í.

– Tá bergholið ímillum Øravík og Hov er komið, er fjarstøða ongin trupulleiki tí tá er ein hálvur tími at koyra ímillum. Og Sumba og Tvøroyri hanga líka væl saman landafrøðiliga sum nógvar kommunur norðanfjørð gera, sum hava lagt sama, sigur hann.